# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tíðin er farin frá uppreistrarrørslum, og tí eigur FARC at leggja vápnini og at lata fangarnar leysar*

*(Hugo Chavez)*

# Illveður kravdi átta mannalív

**Meldurhvirlur og gloprarregn herjaðu fleiri statir í USA um vikuskiftið**

Átta fólk doyðu, fleiri hundrað máttu fara frá húsi og heimi, og fleiri hundraðtúsund mistu streymin, tá meldurhvirlur og gloprarregn herjaðu amerikonsku statirnar Iowa, Indiana, Connecticut og Michigan um vikuskiftið.

Ringast var í Michigan, har seks fólk doyðu. Í Indiana doyði ein maður, tá áarførið fór við bili hansara, og í Connecticut kravdi illveðrið eisini eitt mannalív. Har fingu fýra onnur skaða, tá toran slóð niður.

Í Iowa hava myndugleikarnir ikki vitað um so nógv avfall í fleiri ár, og og í Iowa City standa fleiri býarpartar undir í vatni.




*Í Iowa City hava tey ikki upplivað slíkt regn seinastu 10 árini*

*Mynd: Polfoto*

## STUTT SAGT

### Óvanligt regn

Tað hevur regnað óvanliga illa har suðuri í Kina um vikuskiiftið, og sambært teimum lokalu veðurmonnunum hevur tað ikki regnað so illa har tey seinastu 50 árini. Serliga illa regnaði tað í Guandonglandspartinum, og sambært blaðnum Guangzhou Daily druknaði eitt skúlabarn í áarførinum, og tvey onnur eru ikki komin aftuíaftur. Blaðið veit eisini at siga, at meiri enn 6.000 fólk noyddust at fara frá húsi og heimi, tí alt stóð undir í vatni. Sambært veðurmonnunum regnaði tað meiri enn 400 millimetrar eftir tveimum døgum.

### Eldur í søguligum húsum



*Eingin var inni, tá eldur kom í guvernørhúsini*

*Mynd: AP*

Eini hús í amerikanska býnum Austin fingu stóran skaða av eldi um vikuskiftið. Húsini, sum eru 152 ára gomul, teljast millum tey søguríkastu húsini í statinum Texas, stóðu tóm, tí handverkarar hava arbeitt við at umvæla tey. Sum skilst fingu húsini rættiliga stóran skaða av eldinum, og tað er framvegis eingin, sum veit, hví eldurin kyknaði.

Húsini í Austin hava eina serstøðu, tí guvernørurin í Texas, Rick Perry, býr í teimum, men hann og konan vóru ikki heima, nú eldur kom í. Umframt at virka sum bústaður hjá guvernørinum verða húsini ofta brúkt til almennar móttøkur.

### Byrging kann skrædna

Myndugleikarnir í Kina stúra nú av álvara fyri, at ein stór byrging skal skrædna, soleiðis at stór øki verða løgd undir í vatni. Leygardagin eydnaðist tað at grava eina veit frá byrgingini fyri at lætta trýstið, men áhaldandi regn gjørdi, at vatnið kortini vaks. Fleiri hundrað hermenn royna at grava veitir frá byrgingini, sum hevur staðið til at bresta teir seinastu fjúrtan dagarnar.

# Chavez vil hava FARC at leggja vápnini

**Venesuelski forsetin vil hava uppreistrarrørsluna í Kolombia at leggja vápnini og at lata politisku fangarnar leysar**



*Bardagin við FARC hevur kravt mong mannalív. Í síðsta mánað doyðu 18 fólk í einum samanbresti millum FARC og kolombiska herin*

*Mynd: Polfoto*

- Tað var tann tíð, tá tað var tørvur á uppreistrarrørslum í Latínamerika, men tann tíðin er farin, segði venesuelski forsetin, Hugo Chavez, í sjónvarpssendingini „Alo, presidente“, sum hann hevur eina ferð um vikuna í almenna venesuelska sjónvarpinum. Boðskapurin var ætlaður teirri vinstrasinnaðu FARC-uppreistrarrørsluni í grannalandinum Kolombia.

Hugo Chavez hevur verið lagdur undir at hjálpa FARC við fíggjarligum stuðuli og kanska eisini vápnum, men í sendingini segði hann, at tíðin er komin til frið mog semju. Samstundis heitti hann óbeinleiðis á FARC um at lata teir politisku fangarnar leysar, sum rørslan hevur burturflutt.

- Vit kunnu ikki rættvísgera, og eg havi heldur ongantíð gjørt tað, at fólk verða tikin og flutt niðan í fjøllini, segði Hugo Chavez og sipaði til, at FARC hevur fleiri politiskar fangar sitandi gíslar, teirra millum fyrrverandi kolombiska forsetavalevnið Ingrid Betancourt.

- Tíðin er komin til at tosa um frið, og eg eri til reiðar at fara eftir fangunum hjá FARC, so skjótt rørslan er til reiðar at lata teir leysar, segði venesuelski forsetin.